# Telefonbókin 2008




**Seinasta freist at lata broytingar inn til telefonbókina 2008 er mikudagin 7. november 2007**

**Í mars 2008 verður telefonbókin borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum. Virki, handlar og stovnar skulu boða frá av nýggjum, um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist óbroytt.**

## Hvítu Síður

Mikudagin 7. november 2007 er seinasta freist at koma við rættingum til Hvítu Síðurnar í Telefonbókini fyri 2008 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu Síðurnar er á síðu 563 í Telefonbókini 2007, og skal sendast til: Kundaskráseting, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 31 79 68.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari við undirstrikingum, eykaupptøkum og/ella undirupptøkum. Prísurin er 62,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

**Búmerki:**
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu Síðum. Prísurin fyri búmerki er kr. 2.000,00 (ikki íroknað mvg) fyri hvørja upptøku. Fyri búmerki í litum er prísurin kr. 3.000,00 fyri hvørja upptøku.

## Gulu Síður

Mikudagin 7. november 2007 er seinasta freist at boða frá av nýggjum, um upptøka ynskist í Gulu Síðum.

**Prísir:**
(A) Standardlýsing ........................................ kr. 900,00
(B) Innramming............................................... kr. 1.000,00
(E) Grafisk lýsing fyri mm (min. 30 mm) ....... kr. 30,00
(Sí dømi á s. 565 í Telefonbókini 2007)

**Litlýsingar**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 600,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.400,00. Skrásetingar-/rættingarblað til Gulu Síður er á síðu 564 í Telefonbókini 2007, og skal sendast til: Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn, ella faks 32 11 66.
**GG: Prísirnir á Gulu Síðum eru uttan mvg!**

tel 30 30 30 www.ft.fo www.nummar.fo info@nummar.fo www.gulu.fo info@gulu.fo

FØROYA TELE

# FERÐSLUSAMSKIPARI

Samferðsludeildin sóknast eftir ferðslusamskipara. Sum ferðslusamskipari skalt tú tryggja eina effektiva tilrættalegging og samskipan av dagligu ferðsluni. Ferðslan umfatar fólkaflutning á Bygdaleiðum og Oyggjaleiðum og farmafluting til útoyggjarnar

## Starvið

Uppgávurnar verða m.a.:
- daglig samskipan
- kunning umvegis heimasíðu og fjølmiðlar
- fyriskipa flutningsavtalur
- umsita útoyggjastuðulin
- gera mannagongdir og hondbøkur
- skeiðfyriskipan fyri Bygdaleiðir
- sáttmálaeftirlit við Bygdaleiðum
- verða við í arbeiðinum at gera ferðaætlanir

## Førleikakrøv

Vit rokna við, at tú:
- hevur útbúgving ella royndir innan logistikk, ferðslustýring e.l.
- hevur góðan KT-kunnleika á brúkarastøði
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og málrættað
- ert ágrýtin og hevur góð samstarvsevni
- orðar teg greitt og væl, bæði munnliga og skrivliga

## Umsókn og treytir

Starvið verður sett sambært galdandi sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Arbeiðsstaðurin er í løtuni í Tórshavn. Frá 1. januar 2008 er arbeiðsstaðurin á Tvøroyri. Umsóknarfreistin er hósdagin 8. november.

Send umsóknina við próvskjølum og møguligum viðmælum til: Strandfaraskip Landsins, stílað: Stjóraskrivstovan, Boks 88, FO-110 Tórshavn.

Vilt tú hava meira at vita um starvið, kanst tú venda tær til Regin Vágadal, stjóra, á telefon 343012.

## Fakta:

Uppgávan hjá Samferðsludeildini er at skipa almenna samferðsluøkið. Vit leggja til rættis, stýra, selja, samskipa og kunna um almennu ferðsluna á sjógvi og landi.
Strandfaraskip Landsins reka 29 leiðir (22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir). Til hendan rakstur eru uml. 40 bussar og 8 ferjur. Samlaða talið á starvsfólkum á SL svarar til 120 ársverk.

STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landins (SSL) eru landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, hvørs endamál er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir: 22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir. Samlaða talið av ferðafólkum við SSL í 2006 var 1,1 millión: 620 túsund við bussunum og 480 túsund við ferjunum. Talið av flutningsanleggum er 40 bussar, 8 ferjur og farmaflutningsútbúnaður. Starvsfólkini eru á leið 170 í tali, svarandi til 120 ársverk.

# SØLUSAMSKIPARI

Samferðsludeildin á Strandferðsluni sóknast eftir sølusamskipara.
Sum sølusamskipari fært tú ábyrgd fyri tilrættalegging og samskipan av ferðaseðlaskipanini á Bygdaleiðum og Oyggjaleiðum.

## Starvið

Høvuðsuppgávurnar eru:
- at menna og fyriskipa tænastur til kundabólkarnar
- at umsita ferðaseðla- og hagtalsskipanina Buscom
- at umsita útgerð og viðlíkhald av ferðaseðlamaskinunum
- at fyriskipa dagligu rapporteringina til kundaavrokning og hagtøl
- at fyriskipa eftirlit við ferðaseðlasøluni
- at fyriskipa mannagongdir, vegleiðingar og undirvísing

Talan er um eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, har tú eisini arbeiðir við øðrum uppgávum innan virksemið hjá Samferðsludeildini. Eitt nú verður tú við í arbeiðinum at fyrireika nýggja ferðaseðlaskipan til SSL.

## Førleikakrøv

Vit rokna við, at tú
- hevur útbúgving ella royndir innan handil, logistikk ella líknandi
- hevur gott hegni og góðan førleika innan KT
- er røkin, málrættað/-ur og arbeiðir sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevni og góðan tænastuhugburð
- orðar teg væl, bæði munnliga og skrivliga

## Umsókn og treytir

Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Arbeiðsstaðurin er í løtuni í Tórshavn. Frá 1. januar 2008 er arbeiðsstaðurin á Tvøroyri. Umsóknarfreistin er 8. november. Send umsóknina við próvskjølum og møguligum viðmælum til: Strandfaraskip Landsins, stílað: Stjóraskrivstovan, Boks 88, FO-110 Tórshavn. Vilt tú hava meira at vita um starvið, kanst tú venda tær til Regin Vágadal, stjóra, á telefon 343012.

## Fakta:

Uppgávan hjá Samferðsludeildini er at skipa almenna samferðsluøkið. Vit leggja til rættis, stýra, selja, samskipa og kunna um almennu ferðsluna á sjógvi og landi. Árliga sølan er uml. 43 mió.kr.
Strandfaraskip Landsins reka 29 leiðir (22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir). Til hendan rakstur eru uml. 40 bussar og 8 ferjur. Samlaða talið á starvsfólkum á SL svarar til 120 ársverk.

STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landins (SSL) eru landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, hvørs endamál er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir: 22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir. Samlaða talið av ferðafólkum við SSL í 2006 var 1,1 millión: 620 túsund við bussunum og 480 túsund við ferjunum. Talið av flutningsanleggum er 40 bussar, 8 ferjur og farmaflutningsútbúnaður. Starvsfólkini eru á leið 170 í tali, svarandi til 120 ársverk.

Sosialurin

Lesið Sosialin
-tað loysir seg!